Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, tingkvinna

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Samskipanarfrádráttur hjá lærarum

Spurningar:

1. Kann landsstýriskvinnan greiða frá, hví føroyskir fólkaskúlalærarar skulu rinda skatt av samskipanarfrádráttinum ?
2. Hevur landsstýriskvinnan ætlanir um at avtaka skattin av samskipanarfrádráttinum ?

Viðmerkingar:
Í føroyska lærarahópinum eru tað nógvir lærarar, ið eru danskir tænastumenn og hava fingið danska eftirløn, herímillum samskipanarfrádrátt, inntil eftirlønirnar vórðu heimtiknar. Men meðan samskipanarfrádrátturin bleiv skattafríur fyri danskar lærarar í 1992, so skulu føroyskir lærarar, sum hava verið undir somu skipan, rinda nærum 50 % í skatti. Spurningurin er, um hetta er rætt, og tí verða hesir spurningar settir landsstýriskvinnuni.

Á Løgtingi, 22. novembur 2023

Annika Olsen